# Bókanýtt

*Lagt til rættis: Rigmor Dam*

## Krimi undir jólatræið

**Hannis-fjepparar kunnu nú nøkta krimitørvin, tá fjórða bókin um Hannis Martinsson eftir Jógvan Isaksen kemur á gøtuna í dag. Bókin eitur Adventus Domini.**




"Tað lak út úr hálsinum á tí høvuðleysa manninum. Tað vínreyða teppið framman fyri seingina var druknað í blóði, sum somuleiðis hevði sprænt út á veggin yvirav. Annars sá kamarið á hotellinum í Miðbnum í Havn stak frið-arligt út. Her hevði greid-liga eingin bardagi verið. Bara ein avrætting."

Stutt fyri jól ringir ein umboðsmaður fyri stór-meistaran í Maltesaraord-aninum til Hannis Martins-son og biður hann vera fyri sær á Farstøðini, tá ið hann kemur til Havnar. Frá tí løtu maltesarin er komin til Føroya og til jóla, fara bæði løgnar og harðligar hendingar fram ymsastaðni í landinum. Træðrir eru aftur til krossriddararnar á Rhodos í 16. øld og til S/S Sauternes, sum sakk í Fugloyarfirði í desembur 1941. Múrurin í Kirkjubø hevur somuleiðis ein leiklut.

Føroyaprent legði bókina til rættis, prentaði og bant inn. Mentunargrunnur Studentafelagsins gav út. 253 síður, kostnaður 260 kr.

## Færøblues í bókabúðirnar

**Í dag kemur nýggja danska skaldsøgan Færøblues eftir Lisbeth Nebelong út í Føroyum.**




Færøblues – drengen med celloen er onnur skaldsøgan hjá Lisbeth Nebelong, og onnur skaldsøgan hjá danska rithøvundanum, ið fer fram í Føroyum.

Fyrsta fagurbókmentaliga verk Lisbeths var Når engle spiller Mozart (2003). Færø-blues er sjálvstøðugt verk, men er samstundis onnur bókin í einum ætlaðum trí-bindsverki um lívið í Norð-uratlantshavinum, og hvussu donsk og føroysk mentan renna saman.

Nýggja skaldsøgan snýr seg um nítjan ára gamla Kára, sum flytir úr Føroyum, og í februar 2000 kemur heimaftur at spæla cello á eini konsert í Norðurlanda-húsinum 25 ár seinni.

Eins og Kári búði Lisbeth Nebelong í Havn sum barn og ung í árunum 1965-67 og 1973-74 og hevur síðani vitjað í Føroyum óteljandi ferðir sum rithøvundur, journalistur, skeiðsleiðari og fyrilestrahaldari.



Ein partur av undankanningini til Færøblues gekk fyri seg umborð á trolaranum Bresti, har Lisbeth í trettan dagar fylgdi lívinum umborð, og hon fylgdi eisini symfoniorkestrinum í sambandi við framførsluna av Mozarts rekviem mai 2005 í Norðurlandahúsinum og á Toftum. Bókin verður løgd fram í Sjónleikarhúsinum um klokkan 16 í dag og kemur út í Danmark í januar 2008.

## Tekniska Skúla í Tórshavn tørvar 3 faklærarar

Talan er um størv á:
- Maskindeildini
- Bildeildini
- Trædeildini

Umsøkjarar, sum hava hægri útbúgving, kunnu hava fyrimun.



Vit vænta at umsøkjarar hava:
- Sveinabræv
- Viðkomandi royndir
- Hollan og dagførdan kunnleika

Vit bjóða:
- Spennandi og avbjóðandi størv í eimum umhvørvi, sum er í støðugari menning
- Møguleika fyri dagføring innan økið



Vit ynskja at umsøkjarar:
- Hava hug og hegni at arbeiða við ungdómi
- Kunnu arbeiða sjálvstøðugt og hava góð samstarvsevni
- Duga at loysa trupulleikar, tá id á stendur
- Eru framfýsnir og kunnu geva íblástur at menna arbeiðsplássið

Setanaviðurskiftir:
- Størvini eru fulltíðarstørv at seta 7. januar 2008
- Lønar og sátmálaviðurskifti eru sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Tekniska Lærarafelag



Umsóknir, saman við upplýsingum um útbúgving, royndir og møgulig tilmæli, skulu vera Tekniska Skúla í Tórshavn, P.O.B. 3239, 110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi mánadagin 3. desember 2007.

Nærri fæst at vita um størvini við at venda sær til Jógvan Sørin Hansen, starvsfólkaleiðara, tlf 568070

TEKNISKI SKÚLIN
TÓRSHAVN